## Stór frásøgn frá kappróðrinum á Fjarðastevnu verður í blaðnum í morgin



# Fjarðastevna í Vestmanna 3. juli 2004

**Gentur -7 f. 97- (564 m)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 26 | Ása E. | Nielsen | 1997 | Frælsi | 40 |
| 2 | 2 | 29 | Durita | Hummeland | 1998 | Hvalvík | |
| 3 | 2 | 39 | Marianna G. | Eystberg | 1998 | Bragdið | 34 |
| 4 | 3 | 2 | Sólfríð | Joensen | 1997 | Vestmanna | |
| 5 | 3 | 4 | Paulina | Fuglø | 1999 | Norðdepil | |
| 6 | 3 | 5 | Sigrið | Leivsdóttir | 1998 | Kollafjørður | |
| 7 | 3 | 47 | Mikala | Mørkøre | 1997 | Treysti | 30 |
| 8 | 4 | 0 | Petra | Trondesen | 2000 | Vestmanna | |
| 9 | 4 | 35 | Anna | Eyðtórsdóttir | 1999 | Tórshavn | |

**Dreingir -7 f. 97- (564 m)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 58 | Betuel | Hansen | 1997 | Roysnið | 40 |
| 2 | 1 | 58 | Steingrímur | Hallsson | 1997 | Bragdið | 34 |
| 3 | 1 | 59 | Høgni | Egilstoft Nielsen | 1997 | Frælsi | 30 |
| 4 | 2 | 37 | Sólbjørn | Hansen | 1997 | Nólsoy | |
| 5 | 2 | 43 | Kristian Fróði | Jacobsen | 1997 | Miðvági | |
| 6 | 2 | 49 | Betuel R. | Hansen | 1997 | Roysnið | 26 |
| 7 | 3 | 9 | Rani | Joensen | 1997 | Signabøur | |
| 8 | 3 | 11 | Andrias | á Marknagili | 1999 | Klaksvík | |
| 9 | 3 | 12 | Torkil Søren | Jógvansson | 1999 | Nólsoy | |
| 10 | 3 | 33 | Fríði | Magnussen | 2000 | Bragdið | 23 |
| 11 | 4 | 31 | Finnbogi | Hjørleifsson Joensen | 2000 | Vestmanna | |
| 12 | 4 | 59 | Pól Jóhannus | Debes | 2000 | Vestmanna | |
| DNF | | | Bartal | Poulsen | 1999 | Vestmanna | |

**Gentur -10 f. 94-96 (915 m)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 3 | 49 | Guðrið G. | Eystberg | 1994 | Bragdið | 40 |
| 2 | 4 | 1 | Bjørk R. | Svabo | 1996 | Frælsi | 34 |
| 3 | 4 | 3 | Jórunn | Hansen | 1995 | Roysnið | 30 |
| 4 | 4 | 11 | Durita | Skoradal | 1996 | Roysnið | 26 |
| 5 | 4 | 20 | Randi | Virgarsdóttir | 1994 | Vestmanna | |
| 6 | 4 | 34 | Anna Malan | Jógvansdóttir | 1995 | Bragdið | 23 |
| 7 | 6 | 36 | Durita | Jacobsen | 1994 | Frælsi | 20 |

**Dreingir -10 f. 94-96 (915 m)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 3 | 19 | Rúni | Seloy | 1994 | Bragdið | 40 |
| 2 | 3 | 32 | Regin | Joensen | 1995 | Bragdið | 34 |
| 3 | 3 | 47 | Hanus | Christophersen | 1995 | Vestmanna | |
| 4 | 3 | 58 | Ólavur | Joensen | 1996 | Bragdið | 30 |
| 5 | 4 | 0 | Uni | Falkvard | 1996 | Frælsi | 26 |
| 6 | 4 | 9 | Hørður H. | Johansen | 1995 | Frælsi | 23 |
| 7 | 4 | 12 | Lasse | Plejdrup | 1995 | Vestmanna | |
| 8 | 4 | 28 | Osvald | á Marknagili | 1996 | Treysti | 20 |
| 9 | 4 | 33 | Janus E. | Nielsen | 1996 | Frælsi | 18 |
| 10 | 4 | 42 | Jógvan Emil | Joensen | 1994 | Vestmanna | |
| 11 | 4 | 42 | Magnus | Borgarlíð | 1996 | Vestmanna | |

**Gentur -13 f. 91-93 (1.830 m)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 7 | 8 | Vár | Gregersen | 1993 | Frælsi | 40 |
| 2 | 7 | 39 | Rebekka | Fuglø | 1993 | Treysti | 34 |
| 3 | 7 | 43 | Maria Holm | Lund | 1992 | Bragdið | 30 |
| 4 | 7 | 45 | Silja | Niclasen | 1993 | Frælsi | 26 |
| 5 | 8 | 24 | Bjørg | Seloy | 1992 | Bragdið | 23 |
| 6 | 8 | 27 | Margit | Magnusdóttir | 1992 | Frælsi | 20 |
| 7 | 9 | 9 | Rakul | Joensen | 1992 | Bragdið | 18 |
| DNF | | | Mai | Poulsen | 1992 | Hvannasund | |
| DNF | | | Unn | Bláhamar | 1992 | Vestmanna | |
| DNF | | | Sølva | Nielsen | 1993 | Vestmanna | |

**Dreingir -13 f. 91-93 (1.830 m)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 6 | 5 | Remi | Langgaard | 1991 | Roysnið | 40 |
| 2 | 6 | 14 | Jan Elmar | Sørensen | 1991 | Treysti | 34 |
| 3 | 6 | 43 | Ari | Johannesen | 1992 | Argir | |
| 4 | 6 | 53 | Eli | Falkvard | 1992 | Frælsi | 30 |
| 5 | 7 | 12 | Rógvi | Egilstoft Nielsen | 1992 | Frælsi | 26 |
| 6 | 7 | 19 | Øyvind | Lùtzen | 1993 | Bragdið | 23 |
| 7 | 7 | 23 | Jimmy | Jønsson | 1991 | Roysnið | 20 |
| 8 | 7 | 23 | Hákun | Hansen | 1992 | Bragdið | 18 |
| 9 | 9 | 10 | Hjørtur | Búgvason | 1991 | Bragdið | 16 |
| DNF | | | Janus | Gudmundsen | 1993 | Frælsi | |

**Gentur -17 f. 87-90 (1.830 m)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 7 | 2 | Jenny | Svabo | 1990 | Frælsi | 40 |
| 2 | 7 | 3 | Marin | í Dali | 1989 | Bragdið | 34 |
| 3 | 7 | 27 | Jóna Ásvør | Samuelsen | 1989 | Sandavágur | |

**Dreingir -17 f. 87-90 (1.830 m)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 6 | 2 | Jóan Karl | Joensen | 1987 | Bragdið | 40 |
| 2 | 6 | 10 | Álvur F. | Christiansen | 1989 | Treysti | 34 |
| 3 | 6 | 22 | Daniel D. | Rein | 1990 | Bragdið | 30 |
| 4 | 6 | 34 | Johan Lind | Poulsen | 1987 | Vestmanna | |
| 5 | 6 | 37 | Bárður | Johannesen | 1989 | Argir | |
| 6 | 7 | 45 | Reidar E. | Hansen | 1990 | Vestmanna | |

**Kvinnur f. 59-86 (5 km)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 19 | 58 | Rigmor N. | Arge | 1969 | Bragdið | 40 |
| 2 | 21 | 10 | Borgarhjørt | Holm | 1966 | Bragdið | 34 |
| 3 | 23 | 41 | Sølva | Árnadóttir | 1977 | Bragdið | 30 |
| 4 | 26 | 20 | Solfríð | Fjallsbak | 1977 | Frælsi | 26 |
| 5 | 26 | 37 | Lena Clemens | Poulsen | 1978 | Vestmanna | |
| 6 | 28 | 14 | Maria | Jacobsen | 1974 | Frælsi | 23 |
| 7 | 30 | 28 | Anna Rúna | Jakobsen (KV) | 1958 | Bragdið | 20 |
| 8 | 32 | 35 | Heriet | Djurhuus | 1965 | Vestmanna | |
| 9 | 32 | 41 | Marjun | í Kálvalíð | 1960 | Frælsi | 18 |

**Kvinnur Veteranar f. -58 (5 km)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 30 | 28 | Anna Rúna | Jakobsen | 1958 | Bragdið | |

**Menn f. 59-86 og Menn Veteranar f. -58 (5 km)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 16 | 36 | Sam | Vang | 1970 | Bragdið | 40 |
| 2 | 16 | 42 | Guttorm | Sørensen | 1968 | Treysti | 34 |
| 3 | 16 | 45 | Regin | Zachariasen | 1960 | Bragdið | 30 |
| 4 | 17 | 2 | Jonhard | Larsen | 1966 | Treysti | 26 |
| 5 | 17 | 32 | Sigurð B. | Justinussen | 1967 | Bragdið | 23 |
| 6 | 18 | 18 | Trygvi | Hansen | 1966 | Bragdið | 20 |
| 7 | 18 | 25 | Eyðtór J. | Joensen | 1967 | Bragdið | 18 |
| 8 | 18 | 25 | Súni | Jacobsen | 1967 | Bragdið | 16 |
| 9 | 19 | 1 | Jósvein H. | Olsen (MV) | 1958 | Bragdið | 14 |
| 10 | 19 | 47 | Henry | Olsen | 1964 | Bragdið | 12 |
| 11 | 19 | 49 | Steindor | Hjaltalin (MV) | 1949 | Bragdið | 10 |
| 12 | 20 | 3 | Tummas | Joensen (MV) | 1956 | Treysti | 9 |
| 13 | 20 | 53 | Robert | Vilhelmsen (MV) | 1951 | Bragdið | 8 |
| 14 | 21 | 1 | Dánjal | Samuelsen | 1969 | Tórshavn | |
| 15 | 21 | 36 | Niels | Hansson | 1964 | Bragdið | 7 |
| 16 | 21 | 40 | Sølvi | Ragnarsson | 1978 | Frælsi | 6 |
| 17 | 21 | 51 | Krisjan | Christiansen (MV) | 1952 | Bragdið | 5 |
| 18 | 22 | 13 | Henning C. | Poulsen (MV) | 1951 | Bragdið | 4 |
| 19 | 22 | 35 | Símun | Joensen | 1961 | Bragdið | 3 |
| 20 | 23 | 2 | Hans Birgir | Hansen (MV) | 1949 | Bragdið | 2 |
| 21 | 25 | 52 | Regin | Jóanesarson (MV) | 1943 | Bragdið | 1 |
| 21 | 25 | 52 | Hans Pauli | Strøm (MV) | 1947 | Vestmanna | |

**Menn Veteranar f. -58 (5 km)**

| Nr. | Min. | Sek. | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 19 | 1 | Jósvein H. | Olsen (MV) | 1958 | Bragdið | 40 |
| 2 | 19 | 49 | Steindor | Hjaltalin (MV) | 1949 | Bragdið | 34 |
| 3 | 20 | 3 | Tummas | Joensen (MV) | 1956 | Treysti | 30 |
| 4 | 20 | 53 | Robert | Vilhelmsen (MV) | 1951 | Bragdið | 26 |
| 5 | 21 | 51 | Krisjan | Christiansen (MV) | 1952 | Bragdið | 23 |
| 6 | 22 | 13 | Henning C. | Poulsen (MV) | 1951 | Bragdið | 20 |
| 7 | 23 | 2 | Hans Birgir | Hansen (MV) | 1949 | Bragdið | 18 |
| 8 | 25 | 52 | Regin | Jóanesarson (MV) | 1943 | Bragdið | 16 |
| 9 | 25 | 52 | Hans Pauli | Strøm (MV) | 1947 | Vestmanna | |



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Børn eisini illa viðfarin í irakskum fongslum

**Reyði Krossur og Unicef vilja vera við, at amerikanskir hermenn hava gjørt seg inn á børn í fleiri irakskum fongslum**

FANGAVIÐFERÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í gjárkvøldið avdúkaði týska sjónvarpssendingin "Report Mainz", at fleiri iraksk børn hava verið illa viðfarin í fongslum í Irak, meðan hersetingarvaldið hevur havt ábyrgdina av teimum.

Talsmaðurin hjá Reyða Krossi, Florian Westphal, segði í sendingini, at í tíðarskeiðinum frá januar til mai í ár kom Reyði Krossur fram á 107 børn í seks irakskum fongslum. Hann legði afturat, at kanska eru tey fongslaðu børnini uppaftur fleiri í tali.

Í sendingini varð greitt frá, at sambært einum amerikonskum heryvirmanni bleiv ein 15 ella 16 ára gomul genta kroyst upp í ein krók, tá nakrir amerikanskir hermenn avhoyrdu hana. Síðani skræddu teir klæðini av henni. Tá gentan var hálvnakin, legði hernaðarløgreglan uppí og steðgaði áganginum.

Í einum øðrum føri spulaðu nakrir amerikanskir hermenn ein 16 ára gamlan drong. Aftaná fóru teir út í náttarkuldan við drongin-um og lótu hann sita í einum opnum bili.

# Grundarsteinurin lagdur undir Freedom Tower

**Ein 541 metrar høgur bygningur skal byggjast á staðnum, har World Trade Center stóð**

NEW YORK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanararnir ætla sær nú at vísa heimsins yvirgangsmonnum, at teir lata seg ikki taka av fótum.

Myndugleikarnir í New York hava gjørt av at byggja ein 541 metrar høgan bygning á Ground Zero, har tey bæði tornini hjá World Trade Center stóðu. Metratalið er ikki avgerandi, men heldur tað, at bygningurin verður 1776 føtur høgur og sipar harvið til árið, tá teir sameindu amerikonsku statirnir fingu sjálvsstýri. Tí fær bygningurin eisini heitið Freedom Tower.

Sunnudagin varð tann 20 tons tungi grundarsteinurin lagdur, og eftir ætlanini verður bygningurin liðugur í 2009.

Umleið 500 fólk vóru boðin til hátíðarhaldið sunnudagin. Teirra millum vóru avvarandi hjá fleiri av teimum 2.774, sum doyðu, tá yvirgangsmenn oyðiløgdu World Trade Center tann 11. september í 2001.

– Í dag leggja vit grundarsteinin undir tað, sum skal vera ímyndin av hesum býnum og hesum landinum. Hann skal samstundis ímynda avgerð okkara um at sigra á yvirganginum, segði guvernørurin í New York, Georg Patakis, á hátíðarhaldinum.




*Grundarsteinurin undir Freedom Tower varð lagdur amerikanska frælsisdagin 4. juli. Menninir á myndini eru frá vinstru Michael Blomberg, borgarstjóri í New York, Georg Pataki, guvernørur í New York, og James McGreevey, guvernørur í statinum New Jersey*

# Smáu oyggjarnar vænta at missa skúlarnar

**Nú kommunurnar í Danmark skulu leggjast saman, stúra fær smáu oyggjarnar fyri, at tær fara at miussa skúlarnar**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Danska stjórnin hevur gjørt av at broyta Danmarkarkortið við einum heilt nýggjum bygnaði. Broytingarnar bera millum annað í sær, at tær kommunalu eindirnar skulu vera størri, og tí skulu nógvar kommunur leggjast saman. Eitt úrslit av tí verður, at tær smáu oyggjakommunurnar verða lagdar saman við kommunum inni á landi.

Tær stóru kommunurnar hava longu gjørt greitt, at samanleggingin fer at krevja sparingar á fleiri økjum, og nú stúra fólk á teimum smáu oyggjunum fyri, at sparingarnar fara at raka tey serliga meint. Eitt nú vænta tey, at í framtíðini noyðast børnini av oynni í skúla.

Formaðurin í Sammenslutningen af Danske Småøer, Henry Larsen, krevur, at tær smáu oyggjarnar fáa sína egnu stuðulsskipan, so tær ikki sita eftir við svartaperi, tá tær stóru kommunurnar fara at spara.

– Stuðulin til skúlarnar eigur at vera markaður. Ætlar ein kommuna at lata ein oyggjarskúla aftur, skal hon missa pengarnar. Á tann hátt sparir hon einki við at steingja skúlan, sigur hann við Politiken.

Formaðurin í oyggjanevndini hjá Fólkatinginum, vinstrakvinnan Inger Støjberg, heldur ikki, at ein serlóg skal bjarga oyggjaskúlunum. Hon sigur kortini, at nevndin er greið yvir trupulleikarnar, sum teir smáu oyggjaskúlarnir kunnu koma í orsakað av tí broytta kommunubygnaðinum.

## Milliardir til tubbak

Samstundis sum ES skipar fyri einum tiltaki fyri og øðrum eftir fyri at fáa fólk at roykja minni, letur samveldið tubbaksídnaðinum nógvar milliardir krónur í stuðuli á hvørjum ári.

Sambært Politiken fær tubbaksídnaðurin í ES-londunum meiri enn 40 milliardir krónur í stuðuli árliga, og tað mesta fer til tubbaksbøndur í teimum suðurevropeisku londunum. Inge Haunstrup Clemmensen, yvirlækni hjá Kræftens Bekæmpelse, sigur við blaðið, at ES nýtir meiri pengar til tubbaksídnaðin enn til fyribyrging, og tað heldur hon vera púra burturvið.

Tað eru tubbaksbøndurnir í Geikkalandi, Italia, Spania, sum fáa nógv tann størsta partin av tubbaksstuðlinum, men nakað fer eisini til bøndur í Fraklandi, Týsklandi, Portugal og Belgia. Í 1991 fyri teir 11 milliardir krónur, men síðani er stuðulin minkaður. ES hevur júst samtykt, at teir skulu fáa einar sjey milliardir krónur um árið tey næstu seks árini.

## Bretar kanna njósning

Undan krígnum við Irak vildi bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, vera við, at Irak hevði hópoyðingarvápn, og at landið var ein hóttan ímóti heimsfriðinum. Tí var neyðugt at leypa á.

Men hvat visti bretska stjórnin í veruleikanum? Tað hevur ein nevnd kannað, og um stutta tíð fer hon at almannakunngera frágreiðingina. Blaðið Sunday Times skrivaði fyrradagin, at nakrir av teimum leiðandi monnunum innan bretska njósning fáa av at vita í frágreiðingini. Eitt nú skal nevndin vera komin til ta niðurstøðu, at formaðurin í fregnartænastunevndini hjá Undirhúsinum, John Scarlett, visti nógv meiri, enn hann segði seg vita. Ovastin í fregnartænastuni MI6, Richard Dearlove, sleppur heldur ikki snikkaleysur, skrivar Sunday Times.

Ein kelda í stjórnarumsitingini sigur við blaðið, at kanningarnevndin fer at koma til ta niðurstøðu, at upplýsingarnar frá fregnartænastuni vóru skeivar, og at eftirlitið, sum skal avdúka møgulig mistøk, virkaði ikki.

## "Queen Mary 2" til Bergen

Leygardagin tann 17. juli fær Bergen vitjan av fimm stórum ferðamannaskipum við tilsamans 4.200 ferðafólkum. Manningarnar telja 1500 fólk.

Tað størsta skipið er tað nýggja "Queen Mary 2". Hini eru "Ocean Majesty", "Delphin Renaiseance", "Black Princess" og "Le Diamant". Bergens Tidende skrivar, at tá "Queen Mary 2" fer undir Askøkbrúnna, verður minni enn ein metur ímillum tað ovasta á skipinum og brúnna. Í heitum veðri er brúgvin ein metur lægri enn í vanligum veðri, og tað sama er, um nógv fólk eru á brúnni. Tí umhugsa myndugleikarnir í Bergen at steingja brúnna, so eingin ivi skal vera um, at tað risastóra skipið kann sigla undir henni.

Í Bergen vænta tey sær nógv burtur úr vitjanini. Bergens Tidende skrivar, at hvørt ferðafólk leggur einar 600 krónur eftir seg, og harafturat skulu skipini hava útgerð og tænastur fyri fleiri hundrað milliónir krónur, meðan tey eru inni.

## Naknar kvinnur pløga

Í fjallalandinum Nepal er vandi fyri, at allur gróður miseydnast í ár, og tí hava bøndurnir valt at taka heldur sjáldsom stig.

Tíðindastovan AP skrivar úr høvuðsstaðnum Katmandu, at tað hevur verið turt leingi har vesturi í landinum, og at bøndurnir tí royna allar snildir fyri at fáa nakað av regni. Tað seinasta stigið er at lata naknar kvinnur pløga markirnar. Tann 35 ára gamla Ambika Tharu sigur við blaðið Himalayan Times, at tey gomlu vilja vera við, at naknar kvinnur kunnu gera Guð nøgdan, so at hann fer at lata tað regna.

Vanliga byrjar tað árliga monsunregnið fyrst í juni í Nepal, men soleiðis hevur ikki verið í ár. Taðger, at bøndurnir hava ikki plantað rísið enn.